RÚSDREKKASØLA LANDSINS

# Ársfrágreiðing
# 2013

# Innihaldsyvirlit

1. Inngangur ..... 3

2. Árið ..... 4

3. Búskapur ..... 4

3.1 Sølugongdin gjøgnum árið ..... 5

3.2 Rakstraravlopskravið ..... 5

4. Rúsdrekkasølan – hagtøl ..... 6

4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir ..... 6

4.2 Sølutøl ..... 7

8. Ársroknskapur fyri 2013 ..... 9

Rakstrarroknskapur ..... 9

Fíggjarstøða ..... 10

# 1. Inngangur

Rúsdrekkasøla Landsins er stovnur undir Føroya landsstýri. Rúsdrekkasølan virkar sambært løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 við seinni broytingum og ásetingum í kunngerð nr. 144 frá 20. oktober 1992 við seinni broytingum.

Rúsdrekkasølan hevur til endamáls at innflyta og selja rúsdrekka. Rúsdrekkasølan hevur einkarætt til innflutning av rúsdrekka og við ávísum avmarkingum og undantøkum eisini einkarætt til sølu av rúsdrekka. Stovnurin skal í so stóran mun, sum gjørligt, rekast út frá handilsligum sjónarmiðum, tó við neyðugum atliti til heilsulig sjónarmið.

Rúsdrekkasølan hevur seks handlar kring landið: Í Tórshavn, Klaksvík, Saltangará, Miðvági og á Sandi og Drelnesi. Handlarnir virka eisini sum fløskumóttøkur. Harumframt er goymsla á Hjalla. Fyrisitingin húsast í Tórshavn. Øll hølini eru leigumál.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur umleið 30 fólk í føstum starvi. Harafturat eru upp til 30 tímalønt í starvi.

Í hesi ársfrágreiðing verður tikið samanum árið 2013. Komið verður inn á gongdina í søluni, fíggjarlig viðurskifti og annað, sum hevur merkt árið og raksturin í 2013.

Tórshavn, tann 15. august 2014

Rógvi Andrias Fossádal
stjóri

## 2. Árið

Í hesum partinum verður stutt greitt frá árinum.

Árið 2013 hevur verið merkt av nútímansgerð. Støðið verður áhaldandi ment til, at Rúsdrekkasøla Landsins (RSL) verður fult á hædd við fremstu rúsdrekkasølur í norðurlondum. Tað er avgerandi, at RSL alla tíðina lagar seg til tann eftirspurning, sum viðskiftafólk okkara eftirspyrja.

Sølan í 2013 var 118 mió. kr., sum er nakað lægri enn tær 120 mió. kr. í 2012. Avlopskravið á fíggjarlógini á 16,8 mió. kr. bleiv rokkið. Tað bleiv selt minni av sterkum spiritusi og øli, meðan tað bleiv selt meir av víni. Hetta ávirkaði miðalnýtsluna per. íbúgva soleiðis, at nýtslan fall til lægsta støði síðan RSL varð sett á stovn í 1992. Hetta er í trá við endamálið hjá RSL, ið m.a. sigur, at "Stovnurin skal, í so stóran mun sum gjørligt, rekast út frá handilsligum sjónarmiðum, tó við neyðugum atliti til heilsulig sjónarmið."

Í tíðarskeiðnum 2010 og 2012 gjørdi RSL stórar tillagingar. Fyrst fyri at røkka avlopskravinum, sum øktist úr 11,8 í 2009 til 16,848 mió. kr. í 2010. Tørvur var eisini á at dagføra og uppstiga fleiri handlar kring landið, KT skipanir, førleikamenning o.l. Partur av hesum tillaðingum kom eisini til góðar í 2013.

Starvsfólkakostnaðurin er í tíðarskeiðnum 2008-2013 fallin soleiðis, at hann í 2013 liggur á index 97. Starvsfólkakostnaðurin svaraði í 2013 til 10% av søluni eftir at hava verið uppi á 11% av søluni í 2008, tá starvsfólkakostnaður í mun til sølu var mestur.

Starvsfólkamenning innan vørukunnleika og kundatænastu varð raðfest, og við støði í WSET (Wine & Spirit Education Trust), ið er viðurkendur útbúgvingarstovnur innan vín og spiritus, fekk RSL 7 nýggj starvsfólk, ið hava staðið WSET Level 2. Í dag eru 12 starvsfólk, ið hava staðið WSET Level 2 og 1 starvsfólk, ið hevur staði WSET Level 3. Somuleiðis hevur støðug innanhýsis vøruvitanarmenning verið raðfest gjøgnum árið, umframt kundatænasta.

Árið var eymerkt við dagføring av mannagongdum, KT skipanum o.l.  Millum annað bleiv kassa- og ERP skipanin dagførd. Fyrireikingar til hetta arbeiðið byrjaði seint í 2012 og málið var at seta skipanina í rakstur 1. juni 2013.  Arbeiði av hesari dagføring hevur kraft nógva arbeiðsorku hjá starvsfólkahópinum.

Samanumtikið verður mett, at árið hevur eydnast væl.

## 3. Búskapur

Seinastu seks árini hevur umsetningurin hjá Rúsdrekkasøluni ligið millum uml. 117 og 121 mió. kr.  Í 2013 var ein minking í søluni, í mun til 2012. Í 2013 var umsetningurin tó væl minni enn í 2010, men størri enn 2008, 2009 og 2011. Í mun til 2012 var talan um eina minking í søluni uppá umleið 1,35 mió. kr., frá 120,1 mió. kr. í 2012 til 118,8 mió. kr. í 2013, svarandi til 1,12%.

Umsetningurin fyri seinastu árini sær soleiðis út:

| (1.000 kr.) | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Umsetningur** | 118.800 | 120.140 | 117.659 | 120.743 | 117.799 | 116.844 |

*Talva 3.1: Árligi umsetningurin, 2008-2013*

## 3.1 Sølugongdin gjøgnum árið

Sølan er rættuliga skiftandi gjøgnum árið. Januar og februar eru vanliga mánaðir við lítlari sølu. Um summarið er vanliga meira søla, og somuleiðis fram móti ársskiftinum.

Í 2013 var gongdin í søluni nakað lægri enn árið fyri. Mars, juni og august vóru betur enn væntað. Í februar, apríl, juli, oktober og november var sølan lægri, meðan hinir mánaðirnir vóru umleið sum væntað.

| (1.000 kr.) | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Januar | 6.719 | 6.576 | 6.086 | 6.290 | 6.577 | 6.951 |
| Februar | 7.473 | 7.822 | 7.405 | 7.777 | 8.181 | 8.306 |
| Mars | 10.235 | 9.068 | 8.954 | 10.435 | 8.061 | 8.667 |
| Apríl | 7.859 | 9.301 | 9.436 | 7.560 | 9.397 | 8.484 |
| Mai | 10.887 | 10.814 | 9.823 | 9.958 | 10.054 | 10.131 |
| Juni | 11.210 | 10.949 | 10.400 | 10.536 | 9.942 | 9.599 |
| Juli | 13.054 | 13.844 | 14.402 | 15.957 | 15.243 | 13.360 |
| August | 9.499 | 9.025 | 8.543 | 8.541 | 8.173 | 8.485 |
| September | 8.006 | 7.955 | 9.010 | 8.480 | 7.625 | 8.065 |
| Oktober | 8.445 | 8.811 | 8.842 | 9.460 | 8.995 | 9.510 |
| November | 9.926 | 10.490 | 8.623 | 10.681 | 8.713 | 8.766 |
| Desember | 15.487 | 15.483 | 16.134 | 15.068 | 16.839 | 16.522 |
| Íalt | 118.800 | 120.140 | 117.659 | 120.743 | 117.799 | 116.844 |

*Talva 3.2: Umsetningurin fyri hvønn mánað, 2008-2013*

## 3.2 Rakstraravlopskravið

Í 2010 var kravið til avlop av rakstrinum hækkað við útvið 50%, frá at vera góðar 11,8 mió. kr. til at vera góðar 16,8 mió. kr. Hetta hevur havt við sær príshækkingar á vørunum og rationaliseringar, til tess at minka um útreiðslurnar, har tað ber til – m.a. til viðlíkahald og útskifting av útbúnaði - umframt at sera neyvt eftirlit er við øllum útreiðslupostum.

Ein afturgongd í umsetninginum í 2013 hjá Rúsdrekkasøluni í mun til 2012, kann vera ábending um, at rúsdrekkanýtslan í Føroyum er minkað. Afturgongd er eisini í søluni, tá samanborið verður við 2010.

Talan kann vera um natúrliga variatión í søluni. Sølan kann flyta seg , so t.d. meira ella minni av øli verður selt frá útsølustøðunum hjá føroysku bryggjaríunum, og at meira ella minni verður selt tollfrítt o.s.fr.

Í 2013 minkaði umsetningurin við góðum 1,3 mió. kr. í mun til árið frammanundan og eydnaðist tað at røkka avlopskravinum, sum varð ásett í løgtingsins fíggjarlóg fyri 2013.

Kravið var kr. 16.848.000 aftaná rakstrarútreiðslur og útreiðslur til høli. Tá árið varð gjørt upp, gjørdist avlopið kr. 16.856.196, tvs. ein munur uppá 8.196 kr.

Niðanfyri er í talvu 3.3 eitt yvirlit yvir rakstraravlopini hjá Rúsdrekkasølu Landsins árini 2008-2013.

| (1.000 kr.) | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Avlopskrav | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 11.848 | 11.848 |
| Avlop | 16.856 | 16.849 | 16.308 | 16.505 | 11.731 | 11.733 |
| Munir | 8 | 1 | -540 | -343 | -117 | -115 |

*Talva 3.3: Avlop frá rakstrinum, 2008-2013*

At avlopskravið hækkaði so nógv í 2010, hevði við sær, at fleiri umskipanir vórðu gjørdar, bæði viðvíkjandi prísásetingini og í raðfestingunum innanhýsis. Førleikamenningin varð avmarkað og væl minni er brúkt til íløgur og viðlíkahald, enn í tíðini undan hækkaða avlopskravinum.

Við óbroyttum inntøkum er vandi fyri, at hækkaða avlopskravið fær óhepna ávirkan á tænastustøðið og trivnaðin. Neyðugt er at gera íløgur í t.d. KT og fløskumóttøkur, og at uppraðfesta førleikamenningina aftur – bæði vanligu starvsfólkamenningina og hana, sum er ætlað vørukunnleika/-ráðgeving - umframt at tað fer at gerast alt truplari at liva upp til ásetta avlopskravið.

# 4. Rúsdrekkasølan – hagtøl

Í hesum parti verða nøkur hagtøl og vísutøl sett upp fyri søluna í 2013, og samanborðin við undanfarin ár. Viðmerkingar verða eisini gjørdar til einstøku talvurnar.

## 4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir

| (1.000 kr.) | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | 53.925 | 54.841 | 55.117 | 56.276 | 53.814 | 53.881 |
| Klaksvík | 11.668 | 11.743 | 10.969 | 10.918 | 9.753 | 9.827 |
| Drelnes | 9.481 | 9.124 | 9.091 | 9.474 | 9.298 | 9.748 |
| Miðvágur | 6.874 | 6.961 | 6.693 | 6.867 | 6.069 | 6.145 |
| Skálavík | 2.149 | 2.367 | 2.292 | 2.333 | 2.298 | 2.206 |
| Saltangará | 14.284 | 14.570 | 14.390 | 14.595 | 14.449 | 14.288 |
| Ordrar o.a. | 20.419 | 20.534 | 19.106 | 20.282 | 22.117 | 20.748 |
| Íalt | 118.800 | 120.140 | 117.659 | 120.743 | 117.799 | 116.844 |

*Talva 4.1: Umsetningur, 2008-2013*

Í Talvu 4.1 omanfyri sæst, at umsetningurin hevur verið relativt stabilur árini 2008-2012. Í 2013 var ein afturgongd í umsetninginum uppá útvið 1,3 mió. kr. í mun til í 2012, svarandi til eina minking á umleið 1,13% ímóti einum vøkstri á 2,11% árið undan (2011-2012). Umleið helvtin av umsetninginum stavar frá deildini í Tórshavn.

| (Vísutal) | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | 100 | 102 | 102 | 104 | 100 | 100 |
| Klaksvík | 119 | 119 | 112 | 111 | 99 | 100 |
| Drelnes | 97 | 94 | 93 | 97 | 95 | 100 |
| Miðvágur | 112 | 113 | 109 | 112 | 99 | 100 |
| Skálavík | 97 | 107 | 104 | 106 | 104 | 100 |
| Saltangará | 100 | 102 | 101 | 102 | 101 | 100 |
| Ordrar o.a. | 98 | 99 | 92 | 98 | 107 | 100 |
| Íalt | 102 | 103 | 101 | 103 | 101 | 100 |

*Talva 4.2: Umsetningur, vísutøl 2008-2013*

Í talvu 4.2 eru vísutølini sett til 100 í 2008. Í 2013 eru samlaðu tølini 102. Tað er stórur vøkstur á deildunum í Miðvági og Klaksvík í tíðarskeiðnum 2008-2013. Umsetningurin á hinum deildunum stendur antin í stað ella er fallin hesi seinastu árini. Afturgongd er í umsetninginum í Suðuroy, Sandoy og í ordrum o.l., meðan Saltangará og Tórshavn standa í stað. Tann rættuliga stóra afturgongdin, sum sást í søluni við ordrum frá 2010 til 2011, hevur í 2013 aftur stabiliserað seg soleiðis, at sølan aftur er uppi á støðinum frá 2010. Ordrar verða vanliga avgreiddir gjøgnum høvuðsgoymsluna.

## 4.2 Sølutøl

| (Litrar) | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Heitvín** | 9.718 | 9.236 | 10.067 | 10.685 | 11.129 | 11.424 |
| **Øl** | 980.493 | 1.036.656 | 1.033.268 | 1.101.002 | 1.103.010 | 1.155.663 |
| **Spiritus** | 243.170 | 247.104 | 253.844 | 267.408 | 284.124 | 293.474 |
| **Vín og cider** | 490.093 | 476.926 | 463.496 | 472.140 | 459.834 | 385.798 |
| **Í alt** | 1.723.474 | 1.769.926 | 1.760.676 | 1.851.235 | 1.858.097 | 1.846.359 |

*Talva 4.3: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, 2008-2013*

Í talvu 4.3 er sølan gjørd upp í litrum. Nógv størsti parturin av søluni í litrum er øl. Næststørsti vørubólkur er vín og cider.

| (Vísutal, litrar) | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Heitvín** | 85 | 81 | 88 | 94 | 97 | 100 |
| **Øl** | 85 | 90 | 89 | 95 | 95 | 100 |
| **Spiritus** | 83 | 84 | 86 | 91 | 97 | 100 |
| **Vín og cider** | 127 | 124 | 120 | 122 | 119 | 100 |
| **Íalt** | 93 | 96 | 95 | 100 | 101 | 100 |

*Talva 4.4: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, vísutøl 2008-2013*

Talva 4.4 vísur gongdina sum indekseraði tøl. Størsta minkingin er í bólkunum spiritus & øl, meðan største framgongdin í tíðarskeiðnum 2008-2013 er í vørubólkinum vín og cider. Hetta er eisini í samsvari við, at Rúsdrekkasølan miðvíst hevur arbeitt við at fáa kundarnar at keypa veikari sløg av rúsdrekka, heldur enn sterkari.

| (Alk. litrar) | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Heitvín** | 1.677 | 1.588 | 1.713 | 1.816 | 1.889 | 1.955 |
| **Øl** | 52.435 | 54.925 | 52.774 | 56.057 | 55.918 | 58.555 |
| **Spiritus** | 88.853 | 91.329 | 94.179 | 97.982 | 104.065 | 106.600 |
| **Vín og cider** | 58.138 | 56.220 | 54.718 | 55.089 | 54.016 | 48.332 |
| **Íalt** | 201.104 | 204.061 | 203.384 | 210.893 | 215.888 | 215.441 |

*Talva 4.5: Sølan, gjørd upp í alkohol litrum, 2008-2013*

Í talvu 4.5 er sølan av rúsdrekkanøgdini umroknað til litrar av reinum alkoholi (alkohol litrar). Talvan vísur, at samlaðu alkohol litrarnir falla javnt, sum er í tráð við tálmandi politikkin, sum Rúsdrekkasølan eisini arbeiðir eftir. Útvið helmingurin tvs. uml. 44% av alkohol litrunum stava frá sølu av spiritusi, meðan uml. 30% stava frá vín og cider. Øl stendur fyri 26% av samlaðu nøgdini av seldum alkohol litrum. Samlað sæst, at sølan er minkað við 14.337 alkohol litrum í tíðarskeiðnum 2008-2013

Í talvu 4.6 niðanfyri vísur fyrsta linja talið av fólki í Føroyum í aldrinum 15 ár og eldri tann 1. januar árini 2008-2013.

| | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **15 ár og eldri** | 37.921 | 37.858 | 37.957 | 37.966 | 37.969 | 37.821 |
| **Alk.l./15 ár + (RSL)** | 5,30 | 5,39 | 5,36 | 5,55 | 5,69 | 5,70 |
| **Alk.l./15 ár + (Samlað)** | 6,34 | 6,58 | 6,42 | 6,73 | 6,91 | 6,98 |

*Talva 4.6: Fólkatalið, 15 ár og eldri, tann 1. Januar 2008-2013 og miðal sølan av alkohol litrum*

*Kelda: Hagstovan og egin útrokning*

Um sølan av alkohol litrum gjøgnum Rúsdrekkasøluna (sí talvu 4.5), verður sett í mun til talið av íbúgvum, sum eru 15 ár og eldri sæst, at talið av alkohol litrum hevur verið fallandi, tó við eini lítlari hækking frá 2011 til 2012, sum fall aftur í 2013 til tað lægsta, síðani Rúsdrekkasølan varð sett á stovn. Í 2008 er talið 5,70 alkohol litrar, og er hetta fallið til 5,30 alkohol litrar í 2013, sum ávíst í mittastu linju í talvu 4.6. Men hetta eru bert tølini fyri søluna av rúsdrekka gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins. Niðasta linjan vísir tøl, ið umfata søluna gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins og sølu gjøgnum føroysku bryggjaríini. Afturat hesum tølum skal leggjast tað, sum verður selt tollfrítt og innflutt á annan hátt. Tað finnast ikki almenn hagtøl fyri hesa sølu.

| (Vísutal, alk.l.) | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Heitvín | 86 | 81 | 88 | 93 | 97 | 100 |
| Øl | 90 | 94 | 90 | 96 | 95 | 100 |
| Spiritus | 83 | 86 | 88 | 92 | 98 | 100 |
| Vín og cider | 120 | 116 | 113 | 114 | 112 | 100 |
| Íalt | 93 | 95 | 94 | 98 | 100 | 100 |

*Talva 4.7: Sølan í alkohol litrum, vísutøl 2008-2013*

Talva 4.7 vísur, at vísutalið fyri søluna av alkohol litrum er fallið frá 100 í 2008 til vísutal 93 í 2013. Henda minking er serliga stór í bólkinum spiritus. Alkohol litrarnir í vørubólkinum vín og cider, er einasti bólkur, har alkohol litrarnir eru fleiri, enn teir vóru í 2008.

# 8. Ársroknskapur fyri 2013

Niðanfyri er ársroknskapurin hjá Rúsdrekkasølu Landsins fyri 2013 settur upp í mun til árið 2012.
Roknskapurin fevnir um rakstrarroknskap og fíggjarstøðu.

## Rakstrarroknskapur

| | Ár 2013 | Ár 2012 |
|---|---|---|
| Inntøkur: | | |
| Vørusøla | 118.800.243 | 120.140.323 |
| Vørunýtsla | -82.410.142 | -83.243.959 |
| Skiftisavlop | 36.390.101 | 36.896.364 |
| | | |
| Útreiðslur: | | |
| Starvsfólkakostnaður | 11.962.624 | 12.641.715 |
| Avskrivingar | 1.605.924 | 1.754.063 |
| Annar kostnaður | 6.539.240 | 6.798.474 |
| Útreiðslur íalt | 20.107.788 | 21.194.252 |
| | | |
| Úrslit áðrenn fíggjarpostar | 16.282.313 | 15.702.112 |
| Fíggjarpostar | 2.545 | -985 |
| Roknskaparligt avlop | 16.284.858 | 15.701.127 |

| **Avrokning av avlopi, ásett á fíggjarlógini** | | |
|---|---|---|
| Roknskaparligt avlop | 15.284.858 | 15.701.127 |
| Avskrivingar | 1.605.924 | 1.754.063 |
| Íløgur | -1.034.586 | -606.112 |
| Nettoavlop | 16.856.196 | 16.849.078 |
| Avlop, ásett á fíggjarlógini | 16.848.000 | 16.848.000 |
| Munur | 8.196 | 1.078 |

## Fíggjarstøða

| | 31.12.2013 | 31.12.2012 |
|---|---|---|
| **OGN:** | | |
| Støðisogn | 2.023.164 | 2.594.502 |
| Vørugoymsla | 13.781.217 | 13.671.480 |
| Vøru- og tænastuáognogn | 390.988 | 157.972 |
| Onnur áogn | 3.744 | 55.818 |
| Tíðaravmarkingar | 1.077.332 | 1.058.746 |
| Tøkur peningur | 4.226.112 | 5.041.382 |
| Ogn tilsamans | 21.502.558 | 22.735.180 |
| | | |
| **SKULD:** | | |
| Eginogn | 2.023.164 | 2.594.502 |
| Vøru- og tænastuskuld | 6.631.460 | 5.275.853 |
| Onnur skuld | - | - |
| Millumrokning við Gjaldstovuna | 11.688.225 | 13.255.141 |
| Tíðaravmarkingar | 322.492 | -175.598 |
| Meirviriðisgjald | 833.858 | 1.785.282 |
| Skuld íalt | 19.476.034 | 20.140.678 |
| Eginogn og skuld tilsamans | 21.499.199 | 22.735.180 |
| | | |
| Leasingskyldur | - | - |
| Leiguskyldur pr. ár pr. 31.12. | 2.173.764 | 2.115.265 |